Ganga teldutíðini á møti á Sernámsdeplinum:

# Hentar teldur innan skúlagátt

GÁVA
*Jan Müller*

Fríggjadagin handaði stjórin hjá Statoil Exploration í Føroyum, Rúni Hansen vegna Statoilsamtakið (Statoil, ConocoPhilips, Petro Canada og Shell), skúlanum á Sernámsdeplinum í Havn eina kærkomna gávu. Stuðulin uppá 50.000 kr. er farin til at keypa seks teldur, sum verða bundnar í netið. Tær skulu takast í brúk til komandi skúlaár. Magnus Hansen , stjóri er sera fegin um tað, ið hent er. Hann vísir á, at tað er sera umráðandi, at tey veiku í samfelagnum eisini hava møguleika til at nema sær førleika at brúka telduna. At tey kunnu fylgja við teldutíðini eins og øll onnur. Við hesum tiltakinum fer at bera til at samskipa telduundirvísingina og at skapa næmingunum eitt nýtt og hent umhvørvi, ið kann vera teimum ein góð ballast víðari í lívinum – í hesum teldutíðum. Magnus Hansen sigur, at tey fara at hava skipað undirvísing í teimum ymsu flokkunum longu frá komandi skúlaári. Í hvørjum av flokkunum verða tá 4-5 næmingar.



*Rúni Hansen, stjóri læt vegna Statoilsamtakið Magnus Hansen, skúlastjóra kærkomna gávuø.*
*Mynd Jens K Vang*



# Marknaðarrák

### Rentulækkingar fyribils av

Hækkingin í lánsbrævarentunum næstseinastu viku helt á í farnu viku. Orsøkin var avgerðin hjá amerikanska tjóðbankanum um “einans” at lækka teirra leiðandi rentu við 0,25%-stigum - júst sum meirlutin av marknaðarluttakararnum mettu. Nakrir, ið tó væntaðu eina lækking á 0,50%-stig, gjørdust sostatt vónbrotnir og fóru undir at selja lánsbrøv við hækkandi rentum sum úrsliti. Umframt hetta, var tjóðbankastjórin Alan Greenspan hesuferð meira bjartskygdur, og hann metir nú, at eins stórt sannlíkindi er fyri hækkandi sum lækkandi búskaparvirksemi. Sumstundis kann lesast í røðu Greenspans, at hann metir, at sannlíkindið fyri vantandi prísvøkstri enn er til staðar, hóast sannlíkindið er lágt. Tískil skal ikki roknast við fleiri rentulækkingur í USA fyribils. Vit meta eisini, at evropiski miðbankin fyribils velur at bíða við fleiri rentulækkingum.

Partabrævamarknaðirnir ávirkaðust postitivt av orðum Greenspans, men fríggjadagin fóru partabrævaeigarar at staðfesta vinning og amerikansku og evropisku marknaðirnir fullu aftur. Norðurlendsku marknaðirnir stóðu seg kortini væl, og endaðu vikuna við einum vinningi.

Síðani miðjan juni eru lánsbrævarentur hækkaðar nógv. Umframt at hetta er ávirkað av avgerðini hjá amerikanska tjóðbankanum, eru so at siga bert positiv lyklatøl kunngjørd seinastu vikurnar - lyklatøl sum benda á eina betran í amerikanska búskapinum. Enn er sjálvandi møguligt at gongdin vendur aftur og at lánsbrævarenturnar tí fella aftur. Tó koma avgerðandi tøl hesa vikuna, sum kunnu staðfesta búskaparligu gongdina. Verða hesi tøl bjørt, vilja renturnar hækka meira hesa vikuna. Verða tølini hinvegin vánalig, kann sannroyndin at renturnar eru hækkaðar nógv seinastu dagarnar, lættliga seta eina mótrørðslu í gongd, soleiðis at renturnar lækka eitt vet aftur. Kortini er størri sannlíkindi fyri støðugum til hækkandi rentum enn fallandi rentum hesa vikuna.

Partabrævamarknaðirnir vilja sjálvandi eisini ávirkast av tølunum, ið verða kunngjørd. Vit meta at góður møguleiki er fyri at partabrøv fara at standa seg hampuligt hesa vikuna, tí tøl kunnu fara at vísa, at tað gongur framá í amerikanska ídnaðinum. Orsakað av lutfalsliga høga stiginum, kunnu partabrævamarknaðirnir kortini vera skiftani næstu dagarnar.

Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing Føroyar metir vera álítandi, men Kaupthing Føroyar hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing Føroyar kann heldur ikki ábyrgdast tap ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig | |
|---|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% | ⇨ |
| 2 ára lánsbræv | 2,47% | 0,10% | ⇧ |
| 5 ára lánsbræv | 3,21% | 0,16% | ⇧ |
| 10 ára lánsbræv | 4,04% | 0,16% | ⇧ |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| KFX, Danmark | 218,4 | 1,3% | ⇧ |
| OMX, Svøriki | 535,0 | 0,6% | ⇧ |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.431,5 | -0,1% | ⇩ |
| S&P 500, USA | 976,2 | -0,6% | ⇩ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 107,22 | -0,2% | ⇩ |
| Evru Lánsbrøv | 167,24 | -0,6% | ⇩ |
| Norðon Partabrøv | 63,73 | -0,8% | ⇩ |
| Altjóða Partabrøv | 69,95 | -0,1% | ⇩ |

**Gjaldoyra**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 649,44 | 1,1% | ⇧ |
| EUR | 742,99 | 0,0% | ⇨ |
| GBP | 1.071,36 | 0,0% | ⇨ |
| NOK | 89,97 | -1,1% | ⇩ |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*

Vika 27, 2003
www.kaupthing.fo

ítróttur
Nr. 121 • týsdagur • 1. juli 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Sosialurin á Guernsey:



*Ingrid Bjarnastein, blaðkvinna*



*Álvur Haraldsen, myndamaður*



*Jákup Mørk, blaðmaður*

Oyggjaleikirnir:

# Meira enn ein ítróttaruppgáva



*Heðin Mortensen, forseti í Ítróttarsambandi Føroya, heldur, at Føroyar væl høvdu kunnað verið vertsland fyri oyggjaleikunum í 2007, um miðvíst varð arbeitt fram ímóti tí*

**Heðin Mortensen, forseti í Ítróttarsambandi Føroya, er sannførdur um, at Føroyar kundu væl verið vertsland fyri oyggjaleikunum í 2007. – Men tað krevur, at øll standa saman um tað. Ítróttarfeløg, ferðavinna, kommunalpolitikarar og landspolitikar, og ikki minst føroyska fólkið má taka undir við, at vit bjóða okkum fram. Annars nyttar tað onki, sigur ÍSF forsetin**

OYGGJALEIKIR 2003
*Álvur/Ingrid*

**Guernsey:** Tað eru yvir 100 føroyskir áskoðarar við til oyggjaleikirnar í ár. Og ímillum teir er forsetin í Ítróttarsambandi Føroya, Heðin Mortensen.

– Eg gleði meg hvørja ferð at sleppa til oyggjaleikirnar. Summarfrítíðin verður løgd soleiðis, at eg havi frí tá oyggjaleikirnir eru, og tað eru spennandi og nýggj upplivilsir hvørja ferð, sigur ÍSF forsetin.

Heðin Mortensen dylir ikki fyri, at tað hevði verið ein stór og spennandi uppgáva hjá Føroyum at verið vertsland enn einaferð, men sum er í løtuni, loyva umstøðurnar tí als ikki.

– Tað vantar alt ov nógv í fyri, at vit kunnu vera vertsland aftur. Ítróttarumstøðurnar eru langt frá nøktandi, og tað er nógv sum skal gerast og nógv sum skal betrast. Serliga umstøðurnar fyri frælsum ítrótti eru vánaligar, og eisini tennis og skjóting hava vánalig kor, og hetta má betrast um leikirnir skulu aftur til Føroya.

## Stóran týdning

At vera vertsland fyri oyggjaleikunum er ein stór uppgáva. Tað krevur fleiri milliónir av krónum at fyrireika, og gistingarumstøðurnar skulu eisini verða í lagi.

– Vit hava arbeitt ímóti at fáa oyggjaleikirnar aftur til Føroya, men frá tí vit høvdu leikirnar í 1989 og til dagin í dag, er nógv broytt. Tá búðu ítróttarfólkini á skúlum, har vit høvdu eina matpakka tænastu, og tá vóru »bara« eini 1100 fólk í Føroyum, greiðir Heðin Mortensen frá.

Sum er nú, so høvdu vit ikki megnað at nøkta tørvin á gisting, tí í ár eru sløk 2600 ítróttarfólk umframt áskoðarar á Guernsey. Og her kemur tosið inn á dystin millum Føroyar og Týskland.

– 2600 ítróttarfólk er ikki tað sama, sum 700 týskarar. Men vit kunnu væl bjóða okkum fram, og vit høvdu nærum fingið leikirnar til Føroya í 2005, men vit meldaðu frá aftur, tí vit klára ikki at fyrireika tað, sigur Heðin Mortensen.

– Oyggjaleikirnir eru ein so stór uppgáva nú, at ítróttin megnar hana ikki einsamøll. Tað skal meira til. Hjálp má til frá ferðavinnu, kommunalpolitikarum og landspolitikkarum fyri um vit nakrantíð kunnu stápla leikirnar uppá beinini í Føroyum. Tað kostar nógv at fyrireikar, men tað hevði eisini verið tað vert, tí nógvir pengar koma jú innaftur ígjøgnum leikirnar. Harafturat, so hevði tað, fyri ítróttina í Føroyum, verið eitt risa stig frameftir, at fingið ítróttarumstøðurnar dagførdar.

ÍSF forsetin vísir á, at umstøðurnar í Føroyum eru góðar til nógvar ítróttargreinar, men harafturat vanta eisini nógvar.

– Oyggjaleikirnir eru meira enn ein ítróttaruppgáva nú. Øll mugu verða við. Ein sær her, at ferðavinnan spælir ein risastóran leiklut, og nú vit royna at selja Føroyar sum eitt ferðamannaland, so høvdu oyggjaleikir verið eitt upplagt høvi til at gjørt landið meira kent, heldur Heðin.

Forsetin í ÍSF ivast tó ikki í, at Føroyar væl høvdu klárað at staðið fyri oyggjaleikunum um viljin var til staðar.

– Um ein meinar tað, so skal ein gera nakað við tað. Tað skal vera meira enn tos, og um politiskur vilji hevði verið til tað, so hevði tað tikið okkum tvey ár at fyrireika Føroyar til at vera vertsland, so um vit seta okkum sum mál, at vit vilja hava leikirnar í 2007, so kann tað væl lata seg gera, sigur Heðin Mortensen, forseti í Ítróttarsambandi Føroya, at enda.